## Nógvur svartkjaftur umskipaður

**Fyrrapartin fríggjadagin lá russiska skipið "Aleksey Generalov" á Kollafirði við frystum svartkjafti.**

FISKIVINNA
*Snorri Brend*

**Kollafjørður:** Hetta er svartkjaftur, sum russiskir svartkjaftatrolarar hava umskipað umborð á hetta skipið, og sum nú verður førdur í land til víðari útflutning.

Og tað var ikki hissini nøgd hann hevur ført í land hesa vikuni – eini 3.125 tons netto av svartkjafti. Hetta er helst ein tann størsta nøgdin av slíkum slagi.

Líkt er til, at gongd er komin aftur á hesa samvinnuna á fiskivinnuøkinum. Tí eitt annað russiskt skip hevur eisini verið á Vági í somu ørindum, upplýsir umboð teirra í Føroyum, Faroe Agency.

Annars hava hetlendingar í hyggju at fáa hesi russisku skipini úr føroyskum sjógvi og suður til teirra.

Tey rýmdu hagani, tí myndugleikarnir ikki sýndu teimum ov stóra vælvild, men nú er vent í holuni og nú eru tey knappliga vælkomin aftur.

## Medisinski depilin kostar mest

Ein uppgerð yvir útreiðslurnar á Landssjúkrahúsinum vísa – ikki óvæntað - at medisinski depilin hevði størstu lønarútgjaldingarnar í fjør, – góðar 55 mió. kr. Hinvegin so fíggjar sjúkrahúsið sjálvt 10 % av inntøkum sínum.

Í ársfrágreiðingini frá Landssjúkrahúsinum sæst, at tær samlaðu lønarútreiðslur lógu uppá góðar 229 mió. kr.

Útreiðslurnar til lønir hava í fjør býtt seg m.a. soleiðis: Medisinski depilin 55,5 mió. kr., kirurgiski depilin 47,7 og psykiatriski depilin við 41,8 mió. kr.

Tey í tænastudeplinum hava fingið lønir útgoldnar fyri 40,6 mió., eins og fyrisitingin kostaði 7,7 mió. í lønum, meðan tær klinisku tænasturnar kostaðu 30,1 mió. kr. í fjør.

Landssjúkrahúsið verður – sum vituligt er – í fyrsta lagi fíggjað yvir fíggjarlógina, har løgtingið gevur eina ávísa játtan hvørt árið. Í fjør var játtanin uppá 277,5 mió. kr.

Men ein partur av fíggingini kemur eisini frá egnum inntøkum. Hesar inntøkurnar koma frá sølu í køkinum, goymsluni og leiguinntøkum. Í fjør svaraði hetta til 10 % av rakstrinum.

- Inntøkurnar hava verið eitt sindur hækkandi seinastu árini. Kortini verður nógv tann størsti parturin fíggjaður yvir játtanina, stendur at lesa í frágreiðingini.

Samanlagt vóru 11.536 innleggingar í fjør, og var hetta ein hækking uppá 4,4 % í mun til 2003.
*sb.*

## Tveir bátar tiknir

Tað hevur sum heild verið friðarligt um vikuskiftið, Men tíðliga sunnumorgunin mátti løgreglan í Havn senda boð eftir eykahjálp, tí ein gummibátur fór rekandi norðureftir Nólsoyarfirði við streyminum.

Við sjálva Ovastevnuna í Nólsoy hevur lítið verið at gjørt hjá løgregluni.

Men náttina til sunnudagin var løgreglan kortini í holt við tveir tiknar bátar, - annan í Skálatrøð og hin mitt fjørðinum.

Í fyrra førinum var onkur óboðin farin avstað við einum 4-mannafari, sum lá í havnalagnum í Nólsoy.

Hesin tilburður varð meldaður løgregluni, tá bátur og manning løgdu at landi á Skálatrøð í Havn um 6-tíðina sunnumorgunin, stóð løgreglan fyri teimum. Við hesum báti vóru seks fólk.

Í seinna førinum var talan um ein lættan gummibát, sum kundi komið rættiliga keðiliga fyri, um illa vildi til.

Tíðliga henda morgunin løgdu tríggir mans til brots við árum við endamáli at rógva um fjørðin, helst til Nólsoyar.

Men trupult var hjá teimum at vinna upp land hinumegin, helst tí at tað rak so hart í Nólsoyarfirði.

Báturin fór tí ístaðin rekandi norðureftir. Hetta sóu fólk, og boðaðu tí frá hjá løgregluni, har ikki gjørdist annað enn at senda boð eftir Pressaranum hjá Tórshavnar Skipasmiðju at fáa bátin í rætta havn aftur.
*sb.*

# Fáar vespur at síggja – enn!



*Vanliga skal vespudrotningin, tá hon um várið kemur fram og byrjar at byggja reiður sítt, hava hitan inni í reiðrinium upp móti tríati stigum fyri at kunna yvirliva. Hetta er ikki hent í ár*

**Ikki tí nakar ynskir tær, men munandi færri fráboðanir eru komnar um vespur í ár enn í fjør. Kuldin fyrr í summar er helst orsøkin til, at fleiri teirra ongatíð eru komnar fyri seg í ár**

VESPUPLÁGA
*Snorri Brend*

**Havn:** Tað er langt millum fráboðanirnar um vespur í ár.

Vesputýnarin í Havn, Eirikur Mortensen hevur higartil í ár ikki verið eins niðurringdur av fólki, sum hann var tað í fjør.

- Nei, tað hevur verið meiri friðarligt í so máta, sigur hann við Sosialin.

Higartil í summar eru einans komnar 20 fráboðanir um vespur í høvuðsstaðnum. Hetta er ein minking niður í eina helvt frá í fjør.

- Í fjør høvdu vit nærum fingið 50 fráboðanir áðrenn ólavsøku!, slær Eirikur fast.

### Sama skilið í Danmark

Tað er tó ikki bert í Føroyum at fólk undra seg um fækkaða talið av vespum. Í Danmark er sama støðan.

Hetta er vanliga tíðin, tá tað nærum er ein marra at fara túrar í skógin, sita úti og eta, ella servera ís og sodavatn fyri børnunum.

Vanliga kasta vespurnar seg oman yvir alt, sum er søtt - og stinga haraftrat ein og hvønn, sum kemur ov tætt hesum lítla, men illsinta flogkyktinum.

Hesa broytingina hevur eisini leiðarin á Naturhistorisk Museum í Århus lagt merki til.

Við Jyllandsposten hevur hesin, Peter Gjelstrup sagt, at kalda várið í Danmark helst hevur tikið lívið av einum stórum parti av donsku vespunum.

Hann hevur spurt seg fyri ymsastaðni í Danmark, og tað vísir seg at vera sera fá, sum hava borið eygu við vespurnar. Sjálvur hevur hann ikki sæð eitt einasta vespureiður.

- Hevur kuldin í vár veruliga tikið lívið av fleiri teirra, fara tað at ganga mong ár, til stovnurin kemur fyri seg aftur.

- Um so er, so skulu vespurnar annaðhvørt endurinnflyta seg ella spjaða seg út frá teimum vespafamiljum, sum hóast alt hava yvirlivað kalda várið, ljóða hugaligu boðini frá Peter Gjelstrup.

### Krevja støðugan hita

Hann hevur sjálvur roynt at lokka vespur fram við bæði at leggja honning og súltutoy út.

- Men har er eingin vespa komin fram, og so kemur tað væntandi heldur eingin seinni, sigur hann.

Sambært honum so skal vespadrotningin, tá hon um várið kemur fram og byrjar at byggja reiður sítt, hava hitan inni í reiðrinium upp móti tríati stigum fyri at kunna yvirliva.

- Men er tað kalt, kann tað verða ógjørligt at halda ein støðugan hita á 30 stigum. Og so doyggja bæði drotning og ormvera.

- Tað er helst tað, sum er hent mangastaðni í ár, greiðir hann frá.

## Vespur kring allan býin

Føroyski vesputýnarin, Eirik Mortensen í Havn hevur
higartil í ár fingið bert 20 fráboðanir um vespur. Tær
eru komnar úr ymsum herðashornum í høvuðsstað-
num.

Eirikur Mortensen sigur, at hann hevur bæði fingið
fráboðanir úr Miðbýnum, Gundadali og Vesturbý-
num. So vespurnar eru allastaðni, hóast tær helst eru
— og verða! — færri í tali í ár enn í fjør.

Eitt rættiliga stórt vespureiður varð herfyri avdúkað
í sjálvum býráðssalinum í Havn. Boð vórðu beinan-
vegin send eftir vesputýnaranum, og stutta løtu seinni
var eitt rættiliga stórt vespureiður minni í høvuðsstað-
num.

Hinvegin so kann eingin kenna seg vissan í, um ein
ikki kortini kann koma fram á vespur henda næsta
mánaðin.

Eirikur Mortensen hevur bert við vespureiður at
gera í Havn, men hann veit tí ikki um, hvussu støðan
er í øðrum støðum kring landið.

## Treytir fyri týning

Fyri at kunna fremja týningina nøktandi og munadygt
hevur Tórshavnar kommunan sett tvær treytir, sum
skulu lúkast.

1. Ávísast skal eitt býli ella eitt stað har sum vespur-
nar alla tíðina flúgva inn og út. Týnarin átekur sær
ikki at týna og drepa einstakar flúgvandi vespur.
2. Fráboðarin ella annar av ánaranum heimilaður per-
sónur skal vera inni/heima, meðan týningin verður
framd. Eiturpulvur verður spræænt inn í og uttan um
býlið.

Um býlið t.d. er millum skins og hold, og tað lekur
inn í búrúmini tá spræænt verður, so má onkur vera inni
og siga frá, um eiturpulvurið treingir inn. Um so er
verður støðgað beinanvegin Bert ánari av avvarðandi
ogn ella umboðsfólk ánarans kann biðja um týning.